## Verkstova um fiskiveiðu

Í døgunum 23. og 24. juni verður ein verkstova um fiskiveiðu í Norðsjónum hildin í Keypmannahavn. Talan er um eina verkstovu har serfrøðingar frá ymiskum arbeiðsøkjum fara at tosa um leiklutin hjá fiskivinnuni í Norðsjónum í dag og í framtíðini. Spurningarnir um hvussu gransking kann stuðla uppundir stýringini av fiskiveiðuni og hvussu granskingarúrslit kunnu berast fram. Granskingarráðið sigur, at verkstovan er ein liður í eini røð av PROFET verkstovum, sum er ein týðandi partur av ES fíggjaði PROFET POLICY verkætlanini.



## Tróndur í Gøtu heiðraður

Sigfríður Joensen er um at vera liðugur við bókina um Trónd í Gøtu og gøtuskeggjar. Bókin verður umleið 160 blaðsíður við nógvum litmyndum. Eisini vera ættartalvur yvir kendar persónar úr søgu gøtuskeggja at finna í bókini. Ætlanin er, at bókin skal koma út á Tróndardøgum, sum eru í vikuni 12.-19. juli. Tá verður eisini reist standmynd yvir Trónd í Gøtu. Eisini verða tiltøk við tónleiki, sjónleiki, fyrilestrum, framsýningum, gongutúrum og øðrum.

# Ungur granskari tvær fínar heiðurslønir

**28 ára gamla tvørakvinnan og búskaparfrøðingurin Juanna Schrøter Joensen fær tvær danskar heiðurslønir fyri framúr góð avrik í PhD gransking sínari**

GRANSKING
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Fyrr í ár var 28 ára gamla Juanna Schrøter Joensen, sum arbeiðir á Lærda Háskúlanum í Stockholm, í Føroyum, her hon greiddi frá um kyn og gransking í fyrilestrum, útvarpi og í bløðum.

Juanna fekk prógv sum cand.scient.oecon. í 2005, og nú fær hon tvær fínar viðurkenningar, sum verða handaðar fyrsta dagin.

- Tað er sjálvandi ein stór æra fyri meg at fáa slíkan heiður og viðurkenning fyri granskingararbeiði í míni PhD ritgerð - tað er altíð nakað sum fløvar. Harafturat merkir tað sum fylgir við virðislønunum, at eg nú kann hugsa enn meiri um granskingina í framtíðini, og so hevur tað sjálvandi týdning fyri CV´ið, sigur Juanna við Sosialin. Hon hevur granskað sambandið millum útbúgving, lønarlag og hugin at gera íløgur.

Onnur heiðurslønin er Aarhus Universitets Forskningsfonds (AUFF) Ph.D. pris "fyri bestu Ph.D. ritgerð innan Samfelagsvísind (Det Samfundsvidenskabelige Fakultet) á AU í 2007". Hon verður handað av rektor Laurits B. Holm-Nielsen í Søauditoriet, Aarhus Universitet, 11. juni kl.11. Við heiðrinum fylgja 50.000 kr.

Juana fær eisini Jyske Banks Almennyttige Fonds Pris fyri bestu Ph.D. ritgerð innan búskaparfrøði í 2006-2007. Virðislønin verður givin annaðhvørt ár og verður handað av (administrerende direktør) Klaus Stampe í Riddersalen á Institut for Økonomi, Aarhus Universitet, 13. juni kl.14.



*Juanna Schrøter Joensen fær viðurkenning fyri gransking sína um sambandið millum útbúgving, lønarlag og hugin at gera íløgur*

## Stjól mat frá gestum og endaði í brummuni

**Ein fullur maður varð blakaður í fangaholið fríggjakvøldið, tí gestir á Hvonn fingu ikki matnáðir fyri honum. Annars var friðarligt um vikuskiftið**

VAKTHAVANDI
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Góðveðrið ger fólk góð. Í øllum førum hevur politiið í Havn havt lítið at gera um vikuskiftið, hóast býurin uddi av fólki. Vakthavandi í Bronx sigur við Sosialin, at tveir mans vórðu tiknir inn fríggjakvøldið, báðir tí teir vóru so fullir, at teir vóru til ampa fyri fólk. Annar gekk og forstýraði úti á Café Karlsborg allan dagin, meðan hin órógvaði gestir, sum vóru farnir út at fáa sær ein góðan bita í Hvonn. Millum annað gekk hann og nápaði bitar av matinum hjá fólki, og fekk sær at drekka frá teimum. Til endans varð løgreglan boðsend, og maðurin settur í skansan. Søgan sigur onki um, hvat var á matarskránni á tí hotellinum.

# Leita eftir autismu-genum í Føroyum

**Føroyingar kunnu eiga lykilin til gátuna um autismu. Tí verður í næstum farið undir umfatandi granskingarverkætlan innan hetta økið her heima.**

GRANSKING
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Søkt verður eftir fólki uttan kenda psykiska sjúku, sum kunnu vera kontrolpersónar til stóra granskingarverkætlan innan autismu.

Tað finst longu ein forkanning av føroyskum børnum, sum vísti, at tað eru ikki fleiri fólk við autistiskum breki í Føroyum enn í øðrum londum. Kortini eru her lutfalsliga fleiri dreingir enn gentur við hesum trupulleika, enn aðrastaðni.

Granskingarbólkurin og ílegusavnið siga, at arvur tykist vera ein tann vanligasta orsøkin til autismu, og at av tí at vit eru so fá fólk í Føroyum, skuldi verið lættari at funnið fram til hesar viðbreknu ílegur í Føroyum enn í øðrum londum. Tí verður í næstum farið undir ílegukanningar av føroyingum, sum Tormóður Stórá, yvirlækni og depilsleiðari á Psykiatriska Deplinum og Christopher Gillberg, Professari við Universitetið í Gøteborg saman við øðrum standa fyri.

Verkætlanin er góðkend av Vísindasiðsemisnevndini og Dátueftirlitinum, og luttakararnir, sum hava autismu, verða funnir innan føroyska heilsuverkið. Harafturat er tørvur á fólki, uttan kenda psykiska sjúku, sum vilja vera kontrolpersónar. Luttøkan er sjálvboðin og luttakararnir lata antin blóðroynd ella spýttroynd. Tekning fer fram á lsannos@ls.fo, á telefon 591025 ella 304500, lokal 4101. Spurningar viðvíkjandi granskingarverkætlanini kunnu setast Tormóði Stórá á 30 45 00, lokal 4101 ella t-post: lstost@ls.fo ella Ásu Ellefsen á 218464 ella t-post asel@post.olivant.fo

# Bilboksing á Viðareiði

Fríggjakvøldið var skipað fyri kapping í Bilboksing á planeraða økinum eystan fyri Hotel Norð á Viðareiði, har fimm bilar kappaðust um at geva hinum so stórar snuddir sum gjørligt og samstundis at halda seg sjálvan koyrandi sum longst. Lassin Isaksen og Hilmar Jan Hansen vóru dómarar, og teir góvu stig, alt eftir hvussu væl luttakararnir, sum høvdu hjálm á høvdinum, hildu reglurnar. Stórt sæð alt var loyvt í »dystunum«, sum vardu fimm minuttir hvør, men tó var ikki loyvt at rena á førarahurðina hjá hinum ella eftir sjálvari gronini. Sonni á Horni úr Fuglafirði í einum Volvo 360 vann kappingina. Hinir vóru stigtakarin Jógvan Heinesen í einum Nissan (gamli bilurin hjá Anfinni Kallsberg), Idar Lydersen í einum Renault, Remi á For í einum Toyota og Petur Chodziouk í einum Mazda.

Av Viðareiði verður sagt, at nógv fólk var og hugdi, og fjøldin í bønum oman fyri breytina stuttleikaði sær ófórt, meðan »stóru smádreingirnir« undirhildu við spitaranum í botni, skjótum skiftum millum girini og spolingum á grúsinum, ið viðhvørt gav so nógv støv frá sær, at bilarnir næstan ikki komu undan. Sí eisini myndarøð her á Portalinum

Enn einaferð er tað prógvað, at mannfólk eru og vera smádreingir alt lívið.

rd



Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir